GRUNDFOS

Klaus E. Christiensen,
umhvørvisráðgevi



BAKKAFROST

Regin Jacobsen,
stjóri



IKEA

Jonas Engberg,
deildarstjóri



Burðardygg framleiðsla í heimsklassa

Burðardygg framleiðsla sum fortreyt fyri virkseminum

Umhvørvisleiðsla sum partur av virkseminum hjá IKEA

# Ráðstevna í Norðurlandahúsinum

Tema: Umhvørvisleiðsla og grøn marknaðarføring 13. mai kl. 10.00 – 16.00

## SKRÁ

**10.00 Skráseting og kaffi**
**10.30 Vælkomin**
Elin Lindenskov, forkvinna í heilsu- og umhvørvisnevndini, Tórshavnar kommuna.

**10.40 Rákið í dag**
Margretha Nónklett, fólkalívsfrøðingur.
Í einari ferð gjøgnum føroyska gerandisdagin verður nomið við týðandi evni í gerandislívinum sum lívsstíl, brúkaramentan og umhvørvistilvitan. Tú kennir teg helst aftur í ferðini gjøgnum gerandisdagin.

**11.05 Feskastu tilboðini til vinnuna**
Bárður Michelsen, leiðari, Kommunala Brennistøðin.

Á Kommunalu Brennistøðini verður burturkast frá vinnuni viðgjørt sambært viðurkendari raðfesting. "CO2 roknskapur" er grundarlag undir viðgerðarskipanunum og tilboðum, sum vinnan kann gera nýtslu av í samband við burturkast.

**11.20 Vistfrøði, umhvørvi og ábyrgdarfull søla**
Bo Møller Hansen, marknaðarleiðari, Føroya Keypsamtøka.

Tilvitan um hvørvi og vistfrøði skal raðfestast, tí vit trúgva uppá, at tað er rætt, nú og í framtíðini.

**11.40 Ein grøn bilfyritøka**
Sámal av Reyni, søluleiðari, Reyni Service.

Hvat er ISO14001? Hví er Reyni Service farið í holtur við ISO14001? Hvat skal til fyri at fáa góðkenning? Hvussu langt eru vit komin? Hvørjum vilja vit røkka? Hvat sigur botnlinjan?

**12.00 Døgurðasteðgur**

**13.00 Upplegg til fyrilestrar seinnapartin**
Elin Lindenskov, forkvinna í heilsu- og umhvørvisnevndini, Tórshavnar kommuna

**13.05 Umhvørvisleiðsla sum partur av virkseminum hjá IKEA**
Jonas Engberg, stjóri í deildini fyri burðardygt virksemi, IKEA.

IKEA hevur umhvørvisstrategi, sum fyritøkan støðugt arbeiðir við at seta í verk í dagliga arbeiðinum. Hoyr um samanheingin millum umhvørvistiltøkini hjá IKEA og fíggjarliga partin av virkseminum.

**13.50 Burðardygg framleiðsla - ein fortreyt fyri virkseminum**
Regin Jacobsen, stjóri, Bakkafrost.

Burðardygg framleiðsla er fortreytin fyri virkseminum hjá Bakkafrost. Alifyritøkan arbeiðir áhaldandi við menning á umhvørvisøkinum, so eitt sunt og reint umhvørvi verður tryggjað til gagns fyri fiskatrivnað og virksemi annars. Kom og hoyr um arbeiðið og ágóðarnar av tí.

**14.15 Steðgur**

**14.35 Burðardygg framleiðsla í heimsklassa**
Klaus E. Christensen, umhvørvisráðgevi, Grundfos.

Grundfos hevur umhvørvisleiðslu, t.d. við 14001-certificering og EMAS skráseting. Umhvørvisprofilurin er styrktur við nýggjum vørum á marknaðinum. Hetta ber í sær økt fokus á burðardygd í framleiðsluni. Kom og hoyr um, hvørjar royndir Grundfos hevur gjørt sær.

**15.20 Svanamerkið prógvar sítt virðið í Føroyum**
Hansina Dahl, marknaðarleiðari, Føroyaprent.

Hví hava vit valt Norðurlendsku Svanamerkingina? Hvussu verður ein fyritøka svanagóðkend? Grøn marknaðarføring og botnlinjan.

**15.40 Umhvørvisviðurkenning verður handað**
**15.50 Samanumtøka**
**16.00 Ráðstevnan endar**

Orðstýrari á ráðstevnuni er Óluvá Zachariassen, journalistur.

qonceptz.com

Ráðstevnan um umhvørvisleiðslu og grøna marknaðarføring er ætlað virkjum, stovnum og øllum øðrum áhugaðum. Ráðstevnan verður í Norðurlandahúsinum 13. mai 2011 kl. 10-16. Tilmelding sum skjótast á uv@torshavn.fo. Viðmerk: "Skilavinna" og navn á luttakara og virki/stovni. Kostnaður pr. luttakara er 300 kr. Flytast á konto 9181-2003688. Ráðstevnan er partur av Umhvørvisvikuni 2011. Les meira á www.torshavn.fo

UV UMHVØRVISVIKAN 9.-15. MAI 2011

TÓRSHAVNAR KOMMUNA